Framhald av síðu 35

barnvaksin í Vági.

Núverandi floksformaður, Jóannes Ejdesgaard, hevur ongantíð fingið fleiri persónligar atkvøður, enn hann fekk á valinum fyri fýra árum síðani. Tá fekk hann 709 atkvøður. Hetta er hægri enn hægsta talið, sum Atli P. Dam nakrantíð fekk. Hægsta talið, sum hann fekk, var í 1978. Eftir at Atli P. Dam hevði verið løgmaður í átta ár, atkvøddu 642 suðuroyingar fyri honum.

Men atkvøðutalið hjá Jóannesi Ejdesgaard í 1998 er ikki hægsta talið, sum ein tingmaður í Suðuroy nakrantíð hevur fingið. Hægsta talið var tað, sum Petur Mohr Dam fekk í 1962. Eftir at hann hevði verið løgmaður í fýra ár, atkvøddu 729 í Suðuroyar valdømi fyri honum.

Nógv samband

Sambandsflokkurin hevur altíð átt góða undirtøku í Suðuroy. Síðani floksbýtið í 1906 hevur Sambandsflokkurin í Suðuroyar valdømi átt umdømisvald umboð í tinginum eftir øll løgtingsvalini uttan í 1990, tá hann var eykavaldur.

Fram til 1916 átti Sambandsflokkurin øll fýra umboðini fyri valdømið, og eftir at Javnaðarflokkurin fekk fótafestið í Suðuroy, hevur Sambandsflokkurin verið næststørstur á øllum valunum. Fleiri ferðir hevur flokkurin havt tvey umboð – í 1943, 1954 og í 1958. Á øllum hesum valunum vóru tað Kristian Djurhuus og Andreas Djurhuus, sum vóru umboðini.

Kristian Djurhuus, sum var løgmaður 1950–1958 og 1967–1968, var tingmaður 1932–1962 og 1966–1970. Hann var ikki á listanum í 1962. Kristian Djurhuus hevur fingið fleiri persónligar atkvøður á einum vali enn nakar annar sambandsmaður í Suðuroy. Tað var í 1966, tá hann fekk 274 atkvøður.

Á valinum hesa ferð er eingin á sambandslistanum í Suðuroy, sum áður hevur sitið á tingi. Flemming Mikkelsen, sum við undantaki av einum valskeiði hevur átt tingsessin síðani 1978, stillar ikki uppaftur. Besta persónliga valið hjá Flemmingi Mikkelsen var í 1984, tá hann fekk 300 persónligar atkvøður.

Í 1994 vann Jákup Joensen á Flemmingi Mikkelsen, men hann er ikki á listanum hesa ferð. Seinast sambandssessurin var í norðaru helvt av Suðuroy var valskeiðið 1974–1978. Jákup Mortensen á Tvøroyri kom á ting, tá Andreas Djurhuus ikki stillaði uppaftur.

Tjóðveldið loysti Fólkaflokkin av

Á valinum fyri fýra árum síðani restaði Fólkaflokkinum í Suðuroy bara seks atkvøður at vinna síðsta umdømisvalda mannin frá Sambandsflokkinum. Fólkaflokkurin hevur ikki átt umdømisvaldan tingmann í Suðuroy síðani 1950, tá ið Martin Holm endurvann sessin, sum hann hevði sitið í síðani 1946. Valið hjá Martini Holm í 1950 var tað besta persónliga valið hjá nøkrum fólkaflokksmanni í Suðuroy. Hann fekk ta ferðina 303 persónligar atkvøður.

Frá 1954 og inntil 1962 átti Fólkaflokkurin eykavaldan mann í Suðuroy. Niels Holm Jacobsen í Hvalba røkti hann frá 1954 og inntil 1962. Síðani hevur Fólkaflokkurin ikki megnað at vunnið umboðan í Suðuroy.

Sjálvstýrisumboðanin í Suðuroy hevur seinnu árini verið úr Tjóðveldisflokkinum. Hemming Jespersen á Tvøroyri varð eykavaldur í 1958, men hann fall á valinum í 1962. Síðani hevur tjóðveldisumboðið verið úr sunnaru helvt. Ove Mikkelsen var umdømisvaldur 1970–1978, og aftur 1980–1984. Hergeir Nielsen, sum hevði verið landsstýrismaður 1979–1980, varð umdømisvaldur 1984–1994 og aftur síðani 1998. Besta persónliga valið hjá einum tjóðveldismanni í Suðuroy var tað, tá Ove Mikkelsen í 1974 fekk 369 persónligar atkvøður

Á kreppuvalinum í 1994 vann Kristiligi Fólkaflokkurin og Jákup Olsen síðsta umdømisvalda sessin.

Upp í sjey umboð

Í valskeiðnum, sum nú er runnið, hevur Suðuroyggin ongan eykavaldan tingmann havt. Hetta hevur verið tað vanliga seinastu nógvu árini. Undantøkini vóru 1994–1998, tá Verkamannafylkingin og Ingeborg Vinther høvdu eykavaldan sess, og 1990–1994, tá Flemming Mikkelsen var eykavalt umboð fyri Sambandsflokkin.

Hinar ferðirnar, tá fleiri enn umdømisvaldu suðuroyingarnir hava verið á tingi, eru undan broytingunum í vallógini í 1978. Tá varð talið á umdømisvaldum tingmonnum hækkað úr 20 og upp í 27, meðan hægsta møguliga talið á eykavaldum lækkaði úr tíggju og niður í fimm.

Størsta tingmannatalið, sum Suðuroyar valdømi nakrantíð hevur havt, var eftir valið í 1958. Tá sat tað so mikið væl hjá teimum, at umframt teir fýra umdømisvaldu komu tríggir eykamenn á ting: Niels Holm Jacobsen fyri Fólkaflokkin, Andreas Djurhuus fyri Sambandsflokkin og Hemming Jespersen fyri Tjóðveldisflokkin.

Um Suðuroyar valdømi fer at fáa nakað eykavalt umboð hesa ferð ber sjálvandi ikki til at siga nakað avgjørt um. Sjálvstýrisflokkurin hevur oftast bara havt eykavald umboð. Um hann aftur hesa ferð fær eykavaldar tingmenn, so verður tað í hvussu so er ikki í Suðuroy. Har hevur hann ongan lista.

Burtursæð frá í 1946, tá Sjálvstýrisflokkurin stillaði upp á listunum hjá Javnaðarflokkinum, er tað komið fyri tríggjar ferðir áður, at Sjálvstýrisflokkurin ongan lista hevur havt í Suðuroy – í 1943, 1950 og 1958. Síðani á valinum í 1978 hevur Sjálvstýrisflokkurin í miðal fingið fleiri enn hálvt hundrað atkvøður í Suðuroyar valdømi. Fyri fýra árum síðani var talið 42. Um hetta talið restar fyri at røkka upp um tinggátt ella fyri at fáa næsta mannin, tá tað verður liðugt at telja upp í kvøld, so verður iðranin serliga stór í Sjálvstýrisflokkinum um, at tað ikki eydnaðist teimum at manna ein lista í Suðuroyar valdømi.

1966

Fólkaflokkurin	392
Sambandsflokkurin	710
Kristian Djurhuus	274
Javnaðarflokkurin	1.428
Petur Mohr Dam	663
Joen Pauli Thomasen	281
Johan H. Danbjørg	124
Sjálvstýrisflokkurin	20
Tjóðveldisflokkurin	375
Framburðsflokkurin	28
	2.953

1970

Fólkaflokkurin	362
Sambandsflokkurin	577
Andreas Djurhuus	194
Javnaðarflokkurin	1.406
Atli P. Dam	542
Hilmar Bech	254
Sjálvstýrisflokkurin	21
Tjóðveldisflokkurin	528
Ove Mikkelsen	253
Framburðsflokkurin	52
	2.946

1974

Fólkaflokkurin	453
Sambandsflokkurin	521
Jákup Mortensen	154
Javnaðarflokkurin	1.461
Atli P. Dam	530
Hilmar Bech	303
Sjálvstýrisflokkurin	46
Tjóðveldisflokkurin	585
Ove Mikkelsen	369
Framburðsflokkurin	13
	3.079

1978

Fólkaflokkurin	324
Sambandsflokkurin	772
Flemming Mikkelsen	269
Javnaðarflokkurin	1.551
Atli P. Dam	642
Sverri Midjord	262
Hilmar Bech	260
Sjálvstýrisflokkurin	46
Tjóðveldisflokkurin	515
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin	163
	3.371

1980

Fólkaflokkurin	295
Sambandsflokkurin	720
Flemming Mikkelsen	278
Javnaðarflokkurin	1.515
Atli P. Dam	453
Hilmar Bech	389
Sjálvstýrisflokkurin	59
Tjóðveldisflokkurin	676
Ove Mikkelsen	278
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin	186
	3.451

1984

Fólkaflokkurin	421
Sambandsflokkurin	683
Flemming Mikkelsen	300
Javnaðarflokkurin	1.457
Atli P. Dam	597
Henrik Old	280
Sjálvstýrisflokkurin	90
Tjóðveldisflokkurin	649
Hergeir Nielsen	282
Kristiligi Fólkaflokkurin	138
	3.438

1988

Fólkaflokkurin	408
Sambandsflokkurin	695
Flemming Mikkelsen	270
Javnaðarflokkurin	1.607
Atli P. Dam	557
Henrik Old	366
Sjálvstýrisflokkurin	69
Tjóðveldisflokkurin	654
Hergeir Nielsen	264
Kristiligi Fólkaflokkurin	251
Framsóknarflokkurin	56
	3.740

1990

Fólkaflokkurin	339
Sambandsflokkurin (eyka)	553
Flemming Mikkelsen	210
Javnaðarflokkurin	1.686
Henrik Old	432
Sverri Midjord	426
Jóannes Eidesgaard	264
Sjálvstýrisflokkurin	64
Tjóðveldisflokkurin	582
Hergeir Nielsen	235
Kristiligi Fólkaflokkurin	351
Sosialistiski Loysingarflokkurin	60
	3.635

1994

Fólkaflokkurin	196
Sambandsflokkurin	624
Jákup Joensen	150
Javnaðarflokkurin	1.063
Jóannes Eidesgaard	356
Henrik Old	224
Sjálvstýrisflokkurin	52
Tjóðveldisflokkurin	383
Kristiligi Fólkaflokkurin	450
Jákup Olsen	278
Miðflokkurin	122
Verkamannafylkingin (eyka)	336
Ingeborg Vinter	237
Føroyski flokkurin	33
Frælsisfylkingin	-
	3.259

1998

Fólkaflokkurin	494
Sambandsflokkurin	500
Flemming Mikkelsen	162
Javnaðarflokkurin	1.420
Jóannes Eidesgaard	709
Henrik Old	236
Sjálvstýrisflokkurin	42
Tjóðveldisflokkurin	630
Hergeir Nielsen	203
Kristiligi Fólkaflokkurin	52
Miðflokkurin	95
Verkamannafylkingin	50
	3.283

| | | |